## Føroyskar søgur í Klaksvík

Komandi mánakvøld klokkan 19.30 verða brot úr nýggja filminum »Føroyskar søgur – upplivingar úr gerandisdegnum« at síggja á Klaksvíkar bókasavni. Eisini fer Uni Leitisstein Hansen, sum hevur verið við at savna filmstilfar, at siga frá um arbeiðið. Filmurin lýsir seinastu 100 árini í Føroyum gjøgnum gerandisupplivingar hjá føroyingum. Heitt hevur verið á øll um at koma við gomlum filmsupptøkum, ið kunnu varpa ljós á søgu okkara, og áhugin hevur verið stórur. Fleiri hundraðtals filmsrullur eru savnaðar inn. Burtur úr hesum rúgvusmikla tilfari er gjørt eitt úrval av fangandi og sjálvstøðugum søgum, ið hava upptikið fólk og havt týdning fyri, hvussu vit liva í dag.



*Uni Leitistein Hansen hevur samskipað arbeiðið at savna inn filmstilfar til føroyskar søgur*
*Mynd: Per Højgaard*

## Skeið í arbeiðsmarknaði

Fasti Gerarrætturin skipar fyri einum skeiði í arbeiðsmarknaðarrætti, sum verður hildið á Hotel Føroyum 27. oktober. Skeiðið er býtt í tríggjar partar: Rættargangur fyri advokatar og fakfelagsleiðslu, alment skeið um faklig trætumál fyri øll, ið fáast við arbeiðsmarknað. og um kvøldið er netverk og døgurði á skránni. Luttakaragjaldið er 900 krónur fyri allan dagin, fyrrapart 400 krónur og seinnapart 300 krónur ella 500 krónur við døgurða um kvøldið. Meiri fæst at vita umvegis teldupost fg@fg.fo.

# Samanlegging í Suðuroy má bíða til eftir nýggjár

**Kommunurnar í Suðuroy vilja ikki viðgera spurningin um at leggja saman, fyrrenn eftir eftir nýggjár, tá ið nýggju bý-og bygdaráðini eru mannað**

KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er nú greitt, at tað verður ikki beinanvegin, at farið verður undir eina tilgongd at leggja alla Suðuroy saman í eina kommunu

Tað er greitt, eftir at umboð fyri bý- og bygdaráðini í Suðuroy møttust á felags fundi í Hvalba í gjárkvøldið at viðgera spurningin um kommunusamanlegging.

Við á fundinum vóru eisini Jógvan Mørkøre, stjórnmálafrøðingur, og Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, sum báðir eru í Granskingardeplinum fyri samfelagsgransking.

Teir hava gjørt eitt arbeiðsrit um eina tilgongd, sum skal enda við at øll Suðuroy verður løgd í eina kommunu og á fundinum í Hvalba í gjárkvøldið, har allar kommunur vóru umboðaðar, uttan Fámjin og Sumba.

Teir báðir hava mælt til at fara undir arbeiðið at leggja kommunurnar saman beinanvegin fyri at forða fyri, at politikkur kemur í málið í sambandi við bý- og bygdaráðsvalið 11. november og so at tey, sum stilla upp til kommunuvalið vita frammanundan, at tey koma bara at sita í eitt ár.

### Vilja bíða

Men tað eru tær fimm kommunurnar, sum vóru við á fundinum í Hvalba, ikki samdar í.

Tær eru ikki sinnaðar at fara undir samanleggingina beinanvegin, tí tey siga, at hetta er ein spurningur, sum tey nývaldu kommunustýrini eiga at taka støðu til.

Tey halda ikki, at tað er rætt at hesi kommunustýrini taka eina avgerð, sum bindur kommunustýrini, sum skulu taka við, longu á nýggjárinum og sum sostatt verða tey, sum koma at arbeiða við málinum.

Hinvegin kom eisini greitt fram á fundinum, at kommunustýrini veruliga eru sinnað at taka spurningin upp eftir kommunuvalið, siga kommunustýrislimir, sum vóru við á fundinum og sum vit hava tosað við.

Og verður undirtøka fyri tí, eru tey sinnað at seta ein arbeiðsbólk við umboðum fyri allar kommunur at arbeiða við málinum.

- Í so máta er talan um ein jaligan hugburð til samanlegging, tí kommunustýrini eru veruliga sinnað at taka málið upp, siga kommunustýrislimir fyri Sosialinum.

Tað er eisini semja um, at verður farið undir eina tilgongd fram ímóti at leggja kommunurnar saman, skal tað arbeiðast skjótt, tí ímeðan arbeiðið fer fram, verður nógv virksemið at verða lagt í dvala og tí skal tað avgreiðast so skjótt, sum tilber.

Av tí sama er eisini greitt, at, borgarstjórin á Tvøroyri fær heldur ikki undirtøku fyri at hava fólkaatkvøða í Suðuroy um samanlegging, samstundis sum valið til kommunustýrið er.

Hinar kommunurnar halda ikki, at tað er rætt at hava fólkaatkvøðu, fyrrenn veljarin hevur ein ítøkiligan samanleggingarsáttmála at taka støðu til

Men sostatt er onki at ivast í, at so hvørt sum valstríðið fer at harðna upp undir kommunuvalið, er spurningurin um samanlegging eisini at verða ein alsamt sjónskari partur í valstríðnum.

- Tað eigur tað at verða, sigur kommunustýrislimur við Sosialin eftir fundin í Hvalba í gjárkvøldið.



*Á almennum fundi í farnu viku, varð kommunusamanlegging aftur sett á dagsskrá og tað sær ikki út til, at tankin verður sleptur aftur. Men tað verða tey nýggju kommunustýrini, sum skulu taka við á nýggjárinum, sum eiga bóltin*

# Hvalbingar skulu sleppa at brúka pengarnar sjálvir

**Verður øll Suðuroy løgd saman í eina kommunu, skulu hvalbingar sjálvir sleppa at brúka pengarnar, sum kommunan eigur á bók**

SAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Verður øll Suðuroy løgd saman í eina kommuna, eiga hvalbingar ikki at verða tvingaðir til at avlevera alla sína uppsparing í ein felags kommunukassa.

Tað heldur Tvøroyrar Býráð.

Á fundi í gjárkvøldið umrøddi býráðið spurningin um kommunusamanlegging og har endurtók býráðið samtyktina um, at Suðuroy skal leggja saman í eina kommunu.

Og býráðið heldur, at tað skal ongantíð vera ov skjótt, at øll Suðuroy verður lagt saman í eina kommunu.

Ein kommununa, sum hevur aftrað seg við at leggja saman, er Hvalbiar Kommuna. Otto West, borgarstjóri, segði í samrøðu við Sosialin fyrr í vikuni, at Hvalbiar Kommuna eigur eini 10 milliónir á bók.

Og hann góðtekur undir ongum umstøðum, at hvalbingar uttan víðari bara skulu avlevera hesa upphæddina til hinar kommunurnar í Suðuroy, har tað mesta av honum hevði farið til skuld hjá hinum kommununum, sum flest allar skylda heilt fitt av pengum, serliga tær báðar størstu kommunurnar, Vágur og Tvøroyri.

- Vit skulu ikki brúka at til at betala skuldina hjá øðrum kommunum við, staðfesti Otto West.

Tí kundi hann undir ongum umstøðum góðtaka at fara undir eina samanlegging nú við teirri treyt, at lok verður fyribils lagt á kommunukassarnar og at kommunurnar, hvør í sínum lagi, ikki binda seg til nýggjar íløgur.

- Pengarnir, sum Hvalbiar Kommuna eigur, skal koma sóknarfólkinum til góðar, segði hann.

Hann nevndi møguleikan fyri at gera skúlan tipptopp, ella fyri at gera bátahyl ella okkurt annað. Hinvegin heldur hann ikki, at tey skulu gera íløgur, sum fara at føra leypandi rakstrarútreiðslur við sær.

### Ongin forðing

Hendan spurningin varð eisini til umrøðu á býráðsfundi á Tvøroyri í gjárkvøldið.

Og niðurstøðan í býráðnum er, at tey skilja støðuna hjá hvalbingar, men tey halda ikki, at hetta eigur at verða ein forðing fyri samanlegging.

Hóast øll Suðuroy leggur saman í eina kommunu, eigur tað at bera til at hava eina skiftistíð, har peningurin, sum Hvalbiar kommuna eigur á bók, verður brúktur so at hann kemur sóknarfólkinum til góðar og ikki verður lagdur í felagskassan hjá eini stórkommunu.

- Hava hvalbingar hug at brúka peningin til ymisk endamál í kommununi, eiga vit at finna útvegir fyri tí, so at hvalbingar sleppa at hava peningin, hóast allar kommunurnar verða lagdar saman, er niðurstøðan í Tvøroyrar Býráði.

- Tað eigur ikki at forða fyri eini samanlegging, samtykti býráðið í gjárkvøldið.